

www.oljan.fo

**Jan Müller** 18 - 12 - 2012

# SEV lægsta prísin uppá vindmyllulundina

Elfelagið SEV má sigast at hava vind í seglunum fyri tíðina. Stutt eftir at felagið herfyri tók fimm nýggjar vindmyllur í brúk í Neshaga í Eysturoynni hevur felagið drigið longsta stráið í kapping um at seta upp 13 vindmyllur í Húsadaga nærhendis Havnini. SEV hevði lægsta prísin uppá vindmyllulundina, sum varð útboðin herfyri.Tilboðið er upp á uppsetan av 11,7 MW av vindorkumátti at knýta í elkervið. Petur Joensen, stjóri á Jarðfeingi tók ímóti tveimum boðum, annað frá SP/F Vindrøkt og hitt frá SEV. Tilboðið frá Vindrøkt hevði ein prís upp á 37,5 oyru/kWt, meðan tilboðið hjá SEV hevði ein prís upp á 31,6 oyru/kWt. P/F Magn er við í verkætlanini hjá SEV, har teir fara at eiga ein týðandi part. Johan Dahl, landsstýrismaður fegnaðist um útbjóðingina, og sær hann hetta sum ein fyrimun fyri elbrúkararnar skrivar heimasiðan hjá SEV. Vit takka fyri kappingina elbrúkarunum at frama, og fegnast vit samstundis um eitt framúr gott avrik hjá starvsfólkunum hjá SEV, segði Jákup Suni Lauritsen, nevndarformaður í SEV millum annað í stuttari røðu. Jarðfeingi fer nú í holt við at kanna tilboðini, væntandi fyriliggur úrslit teirra um miðjan januar komandi ár. Myndir - Fólkini hjá SEV og Jarðfeingi, sum hava arbeitt við tilboðnum. Kelda www.sev.fo Vindmyllur hjá SEV í Neshaga